

Sebastian hevur eini 300-400 løg at velja ímillum, men ikki øll riggað til trubadur útsetingina

einaferð við Sebastian, at hann var tann einasti tónleikarin, ið hann kendi, sum kundi skriva eitt lag, ið manglaði. "Men hetta er veruliga so, tá eg geri eina fløgu, so skal hon rigga sum ein eind. Tí manglar onkuntíð eitt ávíst lag, so skrivi eg tað.", sigur Sebastian smílandi.

### Fastur karmur

Sebastian spælir ikki somu spæliskrá hvørt kvøld. Men skiftir av og á nøkur av løgunum út. Eini 5-6 løg eru tó altíð við. Tað er rundan um hesi løg, at restin verður bygt upp. Tey eru eitt slag av føstum karmi rundan um konsertferðina. Sebastian hevur eini 300-400 løg at velja ímillum, men ikki øll riggað til trubadur útsetingina, so úrvalið avmarkar seg sjálvt. Hann sigur, at hann ikki dugur at síggja, hvussu hann skuldi tillagað konsertina í Norðurlandahúsinum mikukvøldið til føroyska marknaðin. Tí hann satt at siga ikki hevur nóg gott innlit í, hvørji løg føroyingar dáma hjá honum. Men hann ger sær altíð ómak við at byggja konsertina soleiðis upp, at hon er áhugaverd, eisini um tú ikki kennir løgini. Sebastian greiður frá, at hann kennur tað, sum um fólk eru øgiliga konsentreraði á konsertunum, og hann metir, at hetta er fyrst og fremst orsakað av, at spæliskráin er løgd til rættis, sum hon er.

### Sebastian í Kanon

Sebastian eigur eina av tónleikaútgávunum, ið eru valdar at vera partur av donsku tónleika kanonini. Talan er um plátuna Stjerne til støv, ið kom út í 1981. Tað er ein arbeiðsbólkur undir danska Mentamálaráðnum, ið hevur valt tær týdningarmiklastu tónleikaútgávurnar at vera tónleika kanon. Sebastian sigur, at hann er glaður um hendan heiður. "Ofta eru tað fjølmiðlar, ið velja hvør skal hava ymiskar heiðurslønir. Men í hesum førinum er tað ein arbeiðsbólkur, ið hevur sitið og diskutera hetta. Tað er stuttligt at verða diskuteraður - At fólk skulu fyrihalda seg til mín tónleik.", sigur Sebastian. Hann heldur, at tað er stuttligari at vera við, enn ikki at vera við. "Tað er eisini stuttligt, at hetta ger, at mín tónleikur verður spældur og diskuteraður í skúlunum. Fólk takað støðu til hann". Nógv kjak hevur verið um Kanoniseringina og bæði Det Gode Selskab, ið umboðar Gasolin og Savage Rose høvuðsmaðurin Thomas Koppel, ið andaðist í vikuni, hava mótmælt, at teirra fløgur verða nýttar í einum politiskum talvi. Sebastian sigur, at hann velur ikki, at síggja hetta sum eitt politiskan heiður enn. Men um tað verður nýtt politistiskt, so heldur hann heiðurin vera meira ivasaman.

### Trubadurens Aften

Við Kanonprátinum er løtan við Sebastian av á hesum sinni. Vit siga farvæl, og hann fer aftur um pallin til hinar, ið bíða eftir honum. Um eina løtu verður salurin fyltur við áhoyrarum, ið vilja hoyra henda frálíka trubadur. Á pallinum stendur gittarin og bíðar og runt í húsunum stákast starvsfólkið við at fáa tað síðsta klárt áðrenn konsertina. Hillerød er um at vera til reiðar til Trubadurens Aften, mikudagin stendur Føroyar fyri tørn.